Viðmerking:

# Javnaðarflokkurin eigur einki í uppsktoinum

*– Tað er at skriva kekkar upp á nakkan á øðrum, tá landsstýrið sigur, at Javnaðarflokkurin eigur uppskotið um, at helvtin av blokkinum skuldi minkast burtur eftir trimum árum, tá hetta var 3% av BTÚ*

Føroya Landsstýri sendi í gjár donskum fjølmiðlum eitt tíðindaskriv, har beinleiðis ósannindir verða borin fram um Føroya Javnaðarflokk. Tí hevur Javnðarflokkurin í dag sent donskum fjølmiðlum soljóðandi tíðindaskriv:

**Pressemeddelse**
Foranlediget af Færøernes Landsstyres pressemeddelelse, dateret København den 19. mars 2000, føler Føroya Javnaðarflokkur (Færøernes Socialdemokrati) sig nødsaget til at komme med en meget vigtig korrektion.

I landsstyrets pressemeddelelse står der: **„ Ifølge forslaget skulle de resterende 650 millioner reduceres væk efter tre år, når de udgjorde 3% af Færøernes bruttonationalprodukt. Dette er en model, der er foreslået af det færøske Socialdemokrati, og som blev en del af oplægget i et forsøg på at imødekomme opp-ositionens ønker på Færøerne.“**

Dette er at udskrive falske checks på nakken af et oppositionsparti. For det første har vi ikke været med til ovennævnte forberedelser og formuleringer, og for det næste er landsstyrets oplæg slet ikke i overensstemmelse med vores partis forslag.

Vi siger i vores program omkring spørgsmålet om bloktilskuddet:

- **Vort synspunkt er, at pengeydelser mellem parterne i et rigsfællesskab har til formål at sikre alle borgere et værdigt liv. Ydelserne fra den danske stat til Færøerne er ikke en almisse, men en naturlig ret i det samarbejde, som rigsfællesskabet er en ramme om.**

- **Men samtidig er det Socialdemokratiets grundsynspunkt, at formålet med ydelsen er, at den enkelte skal blive i stand til at sikre sig et godt liv. Og således også med ydelserne mellem samfund. Ydelserne må have til formål - og indrettes således - at de støtter selvbårenhed.**

- **Socialdemokratiet foreslår, at der opstilles et forhold mellem væksten i det færøske BNP og en reduktion i bloktilskuddet.**

- **Efter denne model kan bloktilskuddet reduceres og bortfalde efter et åremål, uden at det får uheldige konsekvenser for den færøsek økonomi og derved den færøske velfærd. Hvor hurtigt det kan gøres, vil være afhængig af væksten i den færøske økonomi.**

Videre bliver det sagt i partiprogrammet: **„Dette betyder, at vi gøres økonomisk selvbærende, inden vi tager stilling til, om vi skal udtræde af rigsfællesskabet. Det er klart, at det på den måde er mere sandsynligt, at en altafgørende del af befolkningen tilslutter sig den afgørelse, som tages til den tid. Og på denne måde sikrer vi, at ændringerne i det statsretlige forhold ikke fører til en voldsom strid, der vil ødelægge det politiske miljø på Færøerne i mange, mange år.“**

Det vi forestiller os med vores plan for afvikling af bloktilsuddet er, at der findes en procedure i en aftale, der gælder mellem Færøerne og Danmark, men at selve afviklingen finjusteres fra år til år eller fra valgperiode til valgperiode i en forhandling mellem landsstyret og regeringen.

Det er ellers meget forståeligt, at landsstyret har problemer med at identificere sig med sit eget oplæg til økonomisk afvikling, men derfra og til at inddrage vores parti som syndebuk for et uheldigt udspil, det er både uacceptabelt og useriøst.

Indførelsen af et maksimum på 15 år for afviklingen af bloktilskuddet er vi heller ikke kendt med som medlemmer af Lagtingets Udenlandsudvalg.

Der er næppe nogen i det færøske Socialdemokrati, der har arbejdet med en tidshorisont for afviklingen af bloktilskuddet fra mellem 50 og 80 år, så forslaget, der blev præsenteret i Statsministeriet i fredags, må landsstyret tage sit fulde ansvar for.

**Tórshavn den 21. mars 2000**
**Føroya Javnaðarflokkur**

# Til føroyskar fjølmiðlarnar

*Tíðindaskrivið, sum landsstýrið sendir donskum og føroyskum fjølmiðlum sunnudagin*

**Í sambandi við gongdina í sjálvstýrismálinum farnu dagarnar, hevur landsstýrið í dag sent donsku pressuni soljóðandi pressuskriv.**

Pressemeddelelse

Færøernes landsstyre har foreslået halvering af alle danske tilskud og maximum 15 års afvikling af resten.

Den danske presse har de sidste dage — med Finansministeriet som kilde — bragt en række fejlagtige nyheder om Færøernes Landsstyres forhandlingsoplæg vedrørende forhandlingerne om et nyt fællesskab mellem Danmark og Færøerne.

Den mest alvorlige usandhed, som er bragt i pressen, er, at Færøernes Landsstyre i forbindelse med forhandlingerne skal have krævet en økonomisk overgangsordning på over 50 år.

Dette er direkte fejlagtigt, og da det er til stor skade for forhandlingsforløbet, føler Færøernes Landsstyre sig nødsaget til at komme med følgende redegørelse:

Torsdag fik Poul Nyrup Rasmussen, statsminister, overrakt et eksemplar af landsstyrets oplæg til forhandlingerne om en ny samarbejdsaftale mellem Færøerne og Danmark, der medfører, at den færøske befolkning tager det fulde politiske og økonomiske ansvar for sit land.

Oplægget indeholdt bl.a. et forslag til, hvorledes Færøerne kan komme ud af den økonomiske afhængighed af Danmark. Der er tale om et forhandlingsoplæg og på ingen måde et krav. Landsstyret havde lagt op til realitetsforhandlinger om den økonomiske overgangsordning på de kommende møder, hvor der naturligvis vil blive drøftet en lang række mulige modeller.

Det første udspil var følgende:

- At de samlede danske ydelser til Færøerne på én gang — ved traktatens ikrafttrædelse – blev halveret til 650 millioner kroner, samtidig med at den færøske gæld til statskassen bortfaldt.

Dette ville betyde en umiddelbar årlig besparelse for den danske skatteyder på mellem 400 og 600 mio. kr. - alt efter beregningsgrundlaget, som parterne skal blive enige om.

- Ifølge forlaget skulle de resterende 650 millioner reduceres væk efter tre år, når de udgjorte 3% af Færøernes bruttonationalprodukt. Dette er en model, der er foreslået af det færøske Socialdemokrati, og som blev en del af oplægget i et forsøg på at imødegå oppositionens ønsker på Færøerne.

En sådan model, vil være afhængig af væksten i den færøske økonomi, og kan derfor beregnes til mange mulige åremål udfra forskellige præmisser. Hvis Færøerne f.eks. skulle få indtægter fra olie, ville beløbet falde bort efter meget få år.

Foreløbige vurderinger viser, at det færøske bruttonationalprodukt for år 2000, er ca. 8 milliarder. Dette betyder, at 650 millioner udgør ca. 8% af BNP.

Væksten i den færøske økonomi har de sidste 6 år været 9,8% i gennemsnit. Hvis denne vækst fortsætter, ville beløbet falde bort efter 11-12 år.

Men for at sikre en afvikling af støtten uden tilfældighedernes spil, indeholder traktatforslaget tilmed et forslag om, at traktaten kan ophæves i år 2015. Dette ville naturligvis medføre alle subsidiers ophør.

Derfor er der altså i forslaget indeholdt et loft på maximum 15 år.

Færøernes Landsstyre finder det meget kritisabelt, at et dele af traktatforslaget, der i største fortrolighed er udleveret personligt til statsministeren, i fordrejet form bliver offentliggjort således, at Færøernes Landsstyres krav fremstår som urimelige.

Landsstyret finder det tilmed kritisabelt at man, før forhandlingerne er påbegyndt, går ud i offentligheden og stiller ultimative betingelser til sin modpart, samt ved hjælp af fordrejninger fremstiller sin modparts forhandlingsoplæg som urimelige krav om store ydelser.

Landsstyret ønsker ikke at forlænge de økonomiske ydelser fra Danmark. Tværtimod foreslår vi at de eksisterende økonomiske ydelser bliver afviklet.

Færøernes Landsstyre vil afslutningsvis at gøre opmærksom på følgende:

Det, vi ønsker, er en nyt fællesskab mellem Færøerne og Danmark, hvor den færøske nation får ansvaret for sit eget land.

Den nuværende ordning, hvor der er meget uklar fordeling af magt og ansvar, har vist sig at have fatale politiske og økonomiske konsekvenser for Færøerne.

At den færøske nation får det økonomiske ansvar for sit eget land, vil medføre meget store årlige besparelser for den danske skatteyder.

Hvis den færøske befolkning på den anden side ikke tager dette ansvar, vil ydelserne fra Danmark blive stadig større. Udviklingen viser, at subsidieøkonomien medfører en spiral, der gør Færøerne stadig mere afhængige af større og større tilskud fra Danmark.

Med overgangen fra en subsidieøkonomi til en selvbærende økonomi kan ikke ske fra en dag til den anden. Det er derfor vi foreslår, at vi som del af traktaten om det nye fællesskab indgår en aftale om en rimelig økonomisk overgangsordning.

Alternativet til denne hjælp til selvhjælp, er større og større færøsk afhængighed af danske ydelser.

**København d. 19. mars 2000**
**Færøernes landsstyre**

# Jarðfrøðisavnið skipast sum sjálvstøðugur kanningarstovnur

*Ein samanlegging av Náttúrugripasavninum, Biofar og Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum letur seg tó ikki gera fyrr enn seinni, møguliga um eitt ár ella so, sigur Signar á Brúnni, landsstýrismaður*

ÓLAVUR Í BEITI

Signar á Brúnni hevur lagt fram uppskot um broyting í løgtingslóg um Føroya Náttúrugripasavn. Í viðmerkingunum, sigur mentamálaráðharrin, at ætlanin er nú at skipa Føroya Jarðfrøðisavn sum sjálvstøðugan kanningarstovn, ið skal standa landsstýrismanninum í oljumálum til svars.

Fyrimunir eru við hesum, sigur Signar á Brúnni, sum eisini tilmælt verður frá eini nevnd, ið lat landsstýrismanninum sítt tilmæli tann 10. august 1999. Í tilmælinum verður sagt, at Jarðfrøðisavnið verður skipað sum sjálvstøðugur kanningarstovnur við tilvísing til landsstýrismannin í oljumálum, at Náttúruvísindadeildin, Náttúrugripasavnið (undantikið Jarðfrøðisavnið) og Biofar, verða løgd saman í eina víðkaða náttúruvísindaliga megindeild á Fróðskaparsetri Føroya, og at broytingar verða gjørdar í løgtingslógini fyri Fróðskaparsetur Føroya, samstundis sum løgtingslógin um Føroya Náttúrugripasavn verður sett úr gildi.

### At Oljumálastýrinum

– Ein samanlegging av Náttúrugripasavninum, Biofar og Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum letur seg tó ikki gera fyrr enn seinni, møguliga um eitt ár ella so. Hildið verður tó, at tørvurin á eini nýskipan av Jarðfrøðisavninum er so mikið átroðkandi, at henda eigur at verða framd sum skjótast, so at hesi viðurskifti koma í rættlag, áðrenn tað komandi vár verður farið undir tað væntandi stóra takið at viðgera umsóknir frá oljufeløgum um oljuleitingarloyvi v.m.

– Lógaruppskotið ber við sær, at lógin um Føroya Náttúrugripasavn í framtíðini ikki skal fevna um Jarðfrøðisavnið, men at virksemið og skipanin annars á Náttúrugripasavninum verður óbroytt á hesum sinni.

– Ásannandi at høvuðsuppgávan hjá Føroya Jarðfrøðisavni komandi árini verður knýtt at arbeiðnum hjá Oljumálastýrinum, er ætlanin, at Føroya Jarðfrøðisavn skal standa landsstýrismanninum í oljumálum til svars - eins og Fiskirannsóknarstovan stendur landsstýrismanninum í fiskivinnumálum til svars. Á henda hátt verður lættari at samskipa oljujarðfrøðiliga kanningararbeiðið við arbeiðið hjá Oljumálastýrinum, sigur Signar á Brúnni m. a. í viðmerkingunum.



Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

ÍtróttaSosialurin kann eisini lesast á alnetinum: www.sosialurin.fo

# Nú eru bert Neistin og VÍF eftir

*Nú tað bert resta tvey leikumfør eftir í teimum báðum fremstu hondbóltsdeildunum, gerast biðlarnir til heiðursmerkini alsamt færri. Sunnudagin minkaði talið av FM-kandidatum hjá monnunum, samstundis sum tað í kvinnudeildini nú tykist greitt, at silvurmerkini fara til Neistan*



JÁKUP MØRK

Fyri góðum tveimum vikum síðani varð her í blaðnum tikið samanum, hvussu hondbóltslandskappingin fram til tá hevði lagað seg.

Í sama viðfangi mettu vit um, hvussu endaspurturin møguliga fór at síggja út, og í hesum sambandi spáddu vit, at tað allarhelst fór at verða soleiðis, at tað fram til seinasta leikdag føru at verða kanska trý, og í øllum førum tvey lið, sum fóru at hava møguleikan fyri at vinna sær gullmerki.

### Fóru skeivir

Eftir dystirnar um vikuskiftið ber bert til at staðfesta, at í hesum metingum fóru vit púrasta skeivir, tí við sigrinum á StÍF tryggjaði Neistin sær, at tað bert verða tvey, sum hava henda møguleika, og um alt lagar seg til fyrimuns fyri elsta felagið í landinum, kunnu teir fara á vøllin sum føroyameistarar, tá seinasti dysturin verður bríksla ður í gongd.

StÍF hevur nú bert møguleikan at vinna seg upp á 29 stig, og tá Neistin longu hevur rokkið hesum stigatali, umframt at teir eiga dyst móti Tjaldrinum komandi vikuskifti, er einki at ivast í, at teir í øllum førum røkka 31 stigum. Hesum stigatali hevur VÍF eisini møguleika at røkka, um so er, at teir vinna teir báðar seinastu dystirnar, úti móti StÍF og heima móti Neistanum.

Snáva vestmenningar í øðrum av hesum dystum, endar meistaraheitið hjá Neistanum, og hóast tað fyri spenningin hevði verið best, um VÍF megnar at vinna á Skála komandi vikuskifti, so er lítið at ivast í, at Neistaleikararnir einki hava ímóti, at strandingar gera okkurt við Vestmenningar.

Vinna strandingar hendan dystin, gevur hetta eisini teimum møguleikan at vinna silvurmerkini. Hetta hendir um VÍF ikki fær fulla úrtøku móti Neistanum, samstundis sum StÍF vinnur seinasta dystin á Kyndli, sjálvandi treytað av, at teir longu hava vunnið á VÍF.

### Viðvent hjá kvinnunum

Fóru vit skeivir í metingini av mansdeildini, so fóru vit ikki minni skeivir, tá vit mettu um útlitini fyri kvinnudeildini.

Her tóku vit nevnliga saman um silvurdystin, sum tá stóð millum VÍF, Neistin og Kyndil, og niðurstøða okkara varð tá, at tað helst fór at verða Neistin, sum gjørdist tapari av hesum stríðið.

Neistakvinnurnar gjørdu tó bart, tá tær fyri viku síðani leiktu móti komandi føroyameistarunum úr Klaksvík, og tá VÍF og Kyndil leiktu javnt, tóktist greitt, at Neistin í øllum førum endaði omanfyri Kyndil. Hetta vikuskiftið mátti VÍF so lúta suðuri í Vági, so nú er støðan tann, at Neistin við sigri á Tjaldrinum komandi vikuskifti kann tryggja sær silvurmerkini, eina viku áðrenn kappingin endar.

Harumframt hevði stigamissurin hjá VÍF við sær, at tær nú ikki einsamallar kunnu avgera, um tær skulu enda á triðja ella fjórða plássinum.

Skulu tær fáa bronsumerki, skulu tær vinna seinasta dystin móti Neistanum, samstundis sum Kyndil ikki skal vinna, tá tær eina viku frammanundan taka ímóti VB, tí hóast VÍF og Kyndil í løtuni eru jøvn í stigum, so er málmunurin hjá Kyndli somikið nógv betri, at tað ikki verður við hesum, at VÍF skal taka havnarkvinnurnar.

### Skjótt broytist

Sostatt er nú bert eftir hjá okkum at staðfesta, at tað er alt annað enn lætt at spáa um framtíðina, og tískil fara vit ikki at koma við nøkrum boðið um, hvør fer at ogna sær hvørji heiðursmerki hjá monnunum, og ei heldur fara vit at gita nakað um, hvørt tað verða VÍF ella Kyndil, sum ogna sær bronsumerkini í kvinnudeildini.

Jú, skjótt er at fara skeivur í gitingum, tá tosað verður um ítrótt, men tað er eisini júst hetta sum ger, at áhugin fyri ymsu ítróttagreinunum er somikið stórur. Nevnliga vissan um, at einki er vist.